# Takk, takk, søde hr statsminister

BJØRT SAMUELSEN
Løgtingskvinna, Tjóðveldi



**Løgmaður er, eftir at hava tosað við Anders Fogh Rasmussen "serstakliga væl nøgdur" við at føroyska politiska skipanin ikki sleppur framat í samráðingunum um og harvið onga ávirkan fær á bankapakka II**

Samstundis sum politiskar samráðingar eru í Danmark - eisini við andstøðuna - er Føroya løgmaður "væl nøgdur" við at landsstýrið ikki sleppur at sita við borðið – og harvið hvørki fær innlit ella kann bera føroysku áhugamálini fram í fyrireikandi fasuni. Afturfyri fær Anders Fogh Rasmussen eina stóra bukett av reyðum rósum frá okkara løgmanni.

**Føroysku áhugamálini**
Men vit eru fleiri, ið ikki eru eins ovurfegin og løgmaður.

Endamálið við bankapakka II er fyrst og fremst um at tryggja vinnuni og burðardyggum virksemi kreditt.

- Hevur landsstýrið yvirhøvur kannað, um Føroyar og føroyska vinnulívið hevur brúk fyri bankapakka II, ella um okkara vinnulívi tørvar eina aðra loysn, sum er snikkað til tann tørv, ið føroyski fíggjargeirin og føroyska vinnulívið hava?

- Fer bankapakki II at geva tann likviditet, útflutningskreditt og ta fíggjarliga trygd, sum okkara vinnu og okkara borgarum tørvar?

- Hvat kemur bankapakkin at kosta okkum?

- Hvørji átøk ætlar landsstýrið at fremja, fyri at forða fyri, at likviditetur, sum okkara búskapi tørvar, óneyðugt verður fluttur av landinum?

**Lýsa okkara tørv**
Politiska skipanin hevur bráðneyðugan tørv á at fáa staðfest støðuna hjá føroyska fíggjargeiranum, hvussu likviditetsstøðan í Føroyum er í dag, og hvørji átøk eru neyðug fyri best at tryggja vinnuni atgongd til kapital. Sum er, hava vit als ikki eitt grundarlag at meta um hvørt loysnin í bankabakka II verður ein loysn, ið gagnar føroyska fíggjargeiranum, føroysku vinnuni og samfelagnum sum heild.

Ella man landsstýrið hava sett eitt slíkt útgreiningararbeiði í gongd, so Løgtingið fær eitt haldgott grundarlag at taka støðu út ífrá tá bankapakki II verður lagdur fyri Løgtingið? Um so er, vilja vit fegin frætta!

Higartil vita vit bert, at pakkin verður designaður til tørvin hjá danska fíggjargeiranum og donsku vinnuni.

**Umbøn og svar**
Løgmaður bað Anders Fogh um at sleppa við í fyrireikingarnar til bankapakkan, "således at også vi kan forberede sagerne på en god og ordentlig måde i landsstyret såvel som i Lagtinget". Hann fær eitt greitt nei – men játtan um at vit kunnu sleppa at velja um vit taka undir við pakkanum ella ikki – tá alt er leyst og liðugt.

*Hvussu í allari verð kann ein føroyskur løgmaður verða nøgdur við eitt svar sum hetta??*

# Skalaðir stovnar og skerd rættattrygd

HERGEIR NIELSEN



Løgtingið samtykti at lække játtanina til umboðsmannin við kr. 520 tús. fyri fíggjarárið 2009.

Henda avgerð fer at geva umboðsmanninum trupulleikar við virksemi sínum komandi ár, m.a. um tørvur verður á einum setursumboðsmanni el.

Avgerð løgtingsins er ikki í tráð við umboðsmansskipanina, og hartil er hon sera óheppin fyri rættartrygdina.

Gerst tað eftir umboðsmansins tykki neyðugt at lata einum setursumboðsmanni eina ávísa uppgávu, letur hetta seg ikki gera, tí eingin játtan er til endamálið.

Umboðsmaðurin er harafturat munandi skerdur í sínum arbeiðið, og fær ikki virka eftir lógini, hevur hann ikki eina rúmsátta játtan at virka undir.

Onkur heldur kanska, at umboðsmaðurin kann søkja fíggjarnevndina um eykajáttan til endamálið, og so kann fíggjarnevndin velja at geva hesa játtan, ella at vísa hana frá sær, men hetta ber ikki til.

Eftir stýrisskipanarlógini er tað bara landsstýrið, sum kann venda sær til fíggjarnevndina fyri at biðja um eykajáttan til sínar stovnar, tá tørvur er á hesum.

Tá eingin landsstýrismaður hevur tann politiskt óhefta umboðsmannin undir sínum málsræði, er eingin møguleiki at royna hendan leistin.

Vit eru tí komin hartil, at løgtingið eftir tilráðing frá fíggjarnevndinin, hevur skert og heft virksemið hjá tí óhefta umboðsmanninum at politiska valdinum.

Landsgrannskoðanin, sum heldur ongan landsstýrismannin hevur yvir sær, hevur verið fyri somu vanlagnu sum umboðsmaðurin.

Eisini her er ein javnstór upphædd skarvað av játtanini, so at heldur ikki grannskoðanin fær virkað eftir galdandi lógum og reglum, og kanska noyðist at siga fólki úr starvi.

Føroyska fólkaræðið og rættartrygdin eru fyri stórum afturstigi við hesum avgerðum.

Sera viðkomandi er nú at spyrja, um vit í heila tikið skulu hava hesar stovnar, tá vit ikki hava dirvið til at lata teir vera politiskt óheftar, og ikki ráð til at lata teir virkað eftir galdandi reglum.

# Demokrati og vælferð kostar pengar

REIDAR NÓNFJALL



Landskassin fær rættuliga stórar búskaparligar trupulleikar komandi árini – verandi skatta- og avgjaldsinntøkur fara at minka munandi, fáar nýggjar skatta- og avgjaldsinntøkur koma av sær sjálvum í staðin, rakstrarútreiðslurnar hækka og gerast muga fleiri íløgur fyri at skapa vinnuligt virksemi o.a.

Spurningurin er m.a., hvør búskaparpolitikkur hóskar frægast til hetta útgangsstøðið? Í løtuni er onki greitt politiskt svar uppá henda spurningin.

Búskaparliga útgangsstøðið er m.a., at í 2009 er planlagt eitt hall uppá 520 mió.kr. og roknast kann við framhaldandi stórum halli komandi 3-5 árini. Politiskt verður lagt upp til at halda aftur í rakstrarúreiðslunum fyri at minka um hallið á fíggjarlógini – m.a. tí landið uppá sikt kann fáa stórar trupulleikar at fíggja eitt hall ella ein rakstur, sum ikki tamarhald er á politiskt. Ætlanin er kortini at fremja íløgur fyri at skapa vinnuligt virksemi o.a. Vit kunnu eisini her tosa um konjunkturjavnan í búskapinum og stabilisering.

Almennar tænastur eru vorðnar ein alt meira týðandi partur av vælferðini og er ein høvuðsorsøk til, at fólk búleikast í landinum. Tí skal ansast eftit, at almennar kjarnuveitingar (orðing hjá Jóannes Ejdesgaard) og aðrar veitingar verða skerdar ella skornar burtur – avleiðingin kann heilt einfalt gerast fólkafráflyting ella ongin tilflyting. Harfyri verður ikki sagt, at landsstýrið og løgtingið ikki eiga at gera øðrvísi raðfestingar og sparingar, har tað ber til. Av tí, at almennar tænastur eru "ókeypis" fyri flestu borgarar, so kann eftirspurningurin lættliga gerast óendaligur.

Eitt samfelag er sett saman av nógvum individum og málbólkum, sum øll hava ymiskan tørv – og tað kostar tíð, orku og pengar at veita hesum tænastur. Tað skal verða pláss fyri okkum øllum. Vilja vit varðveita demokrati, vælferð, trivna, frælsi og dygd til tann einstaka og serligar málbólkar, so kostar tað peningar. Eri tí samdur við teimum, sum siga, at trýstið á almennar tænastur bara fer at vaksa við kravi, um betri tænastur og fleiri nýggjar tænastur frá tí almenna.

Tað, sum er viðkomandi politiskt, er at fáa til vega faktuella vitan um tænastustøðið í mun til tey samfeløg, sum vit kappast við, um okkara borgarar – roknskaparanlysur og benchmarking er eitt amboð at greina hetta. Spurningurin er, um tørvurin á almennum tænastum er undirtryktur, normalur ella um vit hava ein kappingarføran almennan sektor í mun til okkara grannalond.

Loysnir, sum eru frammi, eru td. trimming, rationaliseringar og sparingar. Men vit hava við at gera eina rættuliga viðbrekna skipan, sum eigur at viðgerðast við skili – leingi at byggja tænastur upp, men nakrar mánaðir at bróta niður. Vit kunnu taka eitt dømi um val av tænastum – valið kann standa ímillum sjúkraviðgerð ella útbúgving – ella skulu vit kalla sjúkraviðgerð eina almenna kjarnuveiting og ikki útbúgving, og hvat við øðrum almennum tænastum, sum onnur halda verða virðisskapandi uppá longri sikt. Logiskt kann sigast, at verða næstan ongi fólk eftir Føroyum, kann alt gera tað sama – tí muga nøkur økir raðfestast meira enn onnur. Tað nýttar lítið at hava góð klæðir og bil, og lurta eftir góðum tónleiki – men ongan mat og drekka.

Samanlegging og felags skipanir er eitt gandaorð – men vit muga ansa eftir ikki at skapa kaos og taka alla motivatión frá einstøku stovnunum og skipanunum. Stóripottur kann hava við sær líkasælu, nakað óstýrligt og flýggjan undan ábyrgd.

Ein kanning í Danmark herfyri vísti, at danir heilt greitt ynskja eina høga vælferð frá tí almenna heldur enn skattalækkingar. Hetta sigur nógv um, hvussu týdningarmikið og høgt borgarin raðfestir eina góða og kontinuerliga almenna tænastu til børn, ung, vaksin og eldri.

Tað er áhugavert, at kanna, hvussu vit kunnu varðveita verandi tænastustøðið, við hvussu stórum halli og í hvussu nógv ár. Í meðan eigur tað almenna at satsa uppá, at skapa karmar fyri vinnuligari menning – eitt nú í útflutningsvinnuni. Bara við einari kappingarførari útflutningsvinnu kunnu vit varðveita og menna ein kappingarføran almennan sektor - alternativt kunnu føroyskir borgarar lætt flyta til onnur lond.

Tað handlar um at tora politiskt at gera neyðugar raðfestingar og ikki skjera javnt við tí úrsliti at skaða allastaðnis. Til hetta krevst amboð sum langtíðarætlanir til rakstur og íløgur. Á henda hátt kunnu vit stigvíst og kontinuerligt byggja upp og skapa dygd í almennu tænastunum – ein almennur sektor, sum eisini kann samstarva professionelt við vinnuna (ikki kappast við vinnuna).

Føroyskir politikarar vilja hava alt, býta gott og ringt javnt, men fáa afturfyri lítil og ongi framstig – minnir nógv um meginreglurnar fyri ein planbúskap. Skuldi nakar ivast, so er knappheit á pengum í Føroyum í løtuni og komandi 10 árini. Einasti møguleikin at skapa bestu búskaparligu úrslitini og skapa størri virðisøking í samfelagnum og vinnuni, er at fokusera og raðfesta rætt. Tað snýr seg um at flyta tilfeingi í nýggjar vinnur og skipanir – og ikki at gera fólk arbeiðsleys.

Hvat er boðskapurin í fyriliggjandi fíggjarlóg 2009 – sparingar allastaðnis, nýggjar inntøkur til landskassan, búskaparligur stabilitetur og hvussu, økt vælferð, nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, raðfestingar av ávísum økjum, effektiviseringar á ávísum økjum, útbjóðing av almennum tænastum, sjálvberandi búskapur, visjón 2015, privatisering av almennum fyritøkum, arbeiðsskapandi íløgur, globalisering, tøknimenning, vinnulig gransking og innovatión, bygnaðarbroytingar, menning av nýggjum útflutningsvinnum, menning av lokaløkjum o.a.s. - ella bara rutina og óendalig avritan av fortíðini?

Kann landsstýrið ella løgtingið, sum hevur samtykt fíggjarlógina, í 3 punktum nevna høvuðsboðskapirnar í fíggjarlógini 2009 – hetta kann brúkast til at fáa áhugabólkar og aktørar í samfelagnum og vinnuni at hjálpa til at náa teimum málum, sum sett verða politiskt.

Er talan um kreppu í samfelagnum snýr politisk leiðsla seg um at skapa stabilitet, men stabilitetur merkir ikki at verða passivur ella afturlítandi. Kreppuleiðsla inniber m.a. innlit, royndir, váðagreiningar, serloysnir, raðfesting, samstarv, samskifti, teamwork, mál, strategi, plan A og B, støðutakan og handling. Spurningurin er um politiska skipanin megnar at loysa eina slíka krevjandi leiðsluuppgávu.